## Kent lík funnið

Myndugleikarnir í tí grikska partinum av Kýpros hava nú funnið líkið av fyrrverandi forsetanum Tassos Papadopoulos, sum bleiv tikið úr grøv hansara fyri trimum mánaðum síðani. Kýpriska løgreglan sigur, at líkið er funnið í einum kirkjugarði í høvuðsstaðnum Nicosia. Løgreglan veit ikki við vissu, um talan er um líkið av Papadopoulos, men tað skulu nakrar DNA-kanningar staðfesta. Líkið av fyrrverandi forsetanum hvarv tann 11. desember í fjør, og Interpol hevur verið við í leitingini. Tassos Papadopoulos var forseti frá 2003 til 2008.



## Kvinna ST-ovasti

Í sambandi við altjóða kvinnudagin í gjár gjørdi ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, av at seta eina kvinnu í starvið sum ovasti leiðari fyri teimum friðarvarðveitandi tiltøkunum hjá heimsfelagsskapinum. Valið fall á ta svensku Anne-Marie Orler. Hon hevur arbeitt sum ráðgevi í friðarvarðveitandi málum tey bæði seinastu árini, men skal nú standa á odda fyri málsøkinum. Áðrenn hon fór at arbeiða hjá ST, var hon løgregluovasti í Vastmanland og formaður í svensku deildini av Amnesty International.

## Tíðindafólk flýggja úr kringvarpinum

**Eitt tíðindafólk fyri og annað eftir fer úr farloyvi frá Kringvarpi Føroya**

KRINGVARP

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Orrusturnar hava verið fleiri í Kringvarpi Føroya seinastu tíðina, og sum skilst hevur hýrurin eisini leingi verið sera vánaligur millum starvsfólkini.

Nú verður stjórin undirdíkt í umsóknum um farloyvi, og higartil hevur hon játtað allar.

Tey, sum hava fingið játtað farloyvi, vilja ikki útgreina, hví tey øll nú vilja burtur frá stovninum. Tey treingja til at gera okkurt annað, siga tey bara.

Men tað kann neyvan vera av tilvild, at so nógv fara at kalla í senn í farloyvi.

Ingi Rasmussen fór í farloyvi 1. mars.

Elin Winther Poulsen, sum ikki var í føstum starvi, gavst eisini 1. mars.

Jóhann Mortensen fer í farloyvi 1. apríl.

Ingolf S. Olsen fer eisini í farloyvi 1. apríl.

1. mai fer Sigmar Bláberg í farloyvi, fyribils í eitt hálvt ár.

Jón Brian Hvidtfeldt, sum varð koyrdur frá sum tíðindaleiðari, skal svara í hesum mánaðinum, um hann hevur hug at halda fram sum vanligt tíðindafólk á stovninum. Um ikki, verður kringvarpið eisini hann fátækari.

Av tí at so nógv eru farin ella fara, hevur kringvarpið sett nøkur fólk fyribils í starv, men hesi fólk steðga bara í nakrar mánaðir.

# Nøkur nólsoyarbørn í skúla í Havn



*Hvønn morgun fara fleiri skúlanæmingar úr Nólsoy við Rituni til Havnar í skúla. Ikki bara tey, sum ganga í framhaldsdeildini, men eisini nøkur yngri, sum foreldrini hava tikið úr skúlanum í Nólsoy og flutt tey til ein skúla í Havn*

**Tórshavnar kommuna heitir á foreldur í Nólsoy um at taka sæti í skúlastýrinum, sum ikki er mannað**

SKÚLI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tá ið skúlastýri seinast skudi setast í Nólsoy, var ikki neyðugt at hava val. Áhugin fyri skúlastýrinum var minni enn so. Skúlastýrið varð mannað, men eykalimir vóru eingir.

Hetta er komið aftur um brekku nú. Tvey fólk, sum vóru í skúlastýrinum, eru flutt úr bygdini, og tí kann stýrið ikki virka.

Mánakvøldið var foreldrafundur, og niðurstøðan á fundinum var, at roynt skal verða at finna tvey foreldur at koma í stýrið í staðin. Tað skal kommunan gera.

Karmarnir um skúlan í Nólsoy eru góðir, men okkurt er galið við skúlanum, tí nøkur foreldur hava tikið børn síni úr skúlanum.

### Ymikar orsøkir

Ein familja er flutt úr kommununi, og tað er so tað. Onkur er farin til Havnar, sum er sama kommuna, men tað eru eisini tey, sum senda børn síni við Rituni til Havnar í skúla hvønn morgun. Tað eru alt børn í teimum eldru flokkunum.

Í onkrum føri eru børn farin til Havnar at ganga í skúla av sosialum orsøkum, við tað at eingir ella fáir javnaldrar vóru eftir í skúlanum.

Einki foreldur, sum Sosialurin hevur tosað við, hevur hug at stíga fram, tí viðurskiftini eru so smá í so lítlari bygd.

Eitt foreldur gremur seg um góðskuna av undirvísingini av teimum størru børnunum. Har vantar skikkaður lærari, siga tey. Tey smáu fáa góða undirvísing, verður sagt.

Atfinningar verða eisini vendar móti fyrsta læraranum Jákupi av Skarði, sum hevur annað starv við síðuna av skúlaleiðarastarvinum.

Jákup av Skarði vísir á, at í setanarviðurskiftum hansara er rúm fyri at hava eitt annað starv, og tað hevur hann havt leingi. Tað starvið er at vera ráðgevi hjá Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð.

### Torført at fáa lærarar

Annars hevur hann ikki hug at gera viðmerkingar til, hví nøkur børn fara í skúla í Havn, tí orsøkirnar eru fleiri, og hann leggur ikki í at koma inn á persónlig viðurskifti hjá nøkrum.

Hann heldur, at Nólsoyar skúli er rímiliga væl fyri við lærarum, men tað er ikki lætt at fáa lærarar. Í apríl væntar skúlin at fáa ein útbúnan lærara aftrat. Onkur nólsoyingur gongur á læraraskúla, og fyrsti lærarin vónar, at viðkomandi hevur hug at koma til Nólsoyar at arbeiða, tí ið prógvið er komið.

Bara 21 børn eru eftir í skúlanum, og Jákup av Skarði væntar ikki, at bygdin fer at vaksa tað stóra. 40 hús standa tóm, og eigararnir vilja hvørki selja ella leiga út. Hugurin at byggja er ikki stórur, tí grundstykkini kosta nú tað sama sum í Havn, við tað at Nólsoy er í Tórshavnar kommunu.

Jákup av Skarði ber ikki ótta fyri, at skúlin í Nólsoy letur aftur, tí karmarnir eru so góðir, og skúlin er har, sum børnini búgva.